# Strika skattalættan fyri at fíggja minni oljuavgjald

**Samgongutingmaðurin John Johannessen heldur, at ætlaði skattalættin hjá landsstýrinum skuldi verið strikaður fyri at fíggja eina minking í oljuavgjaldinum hjá landinum. Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum heldur, at tað verður trupult at ganga burtur frá samgonguavtaluni um skattalætta**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



Oljuprísurin er blivin so høgur, at landskassin átti at slaka við sínum oljuavgjaldi.

Tað heldur samgongutingmaðurin John Johannessen, sum vil fíggja eina minking í oljuavgjaldinum við at strika ætlaða skattalættan hjá landsstýrinum.

– Skattalættin skuldi verið avtikin fyri at fingið oljuavgjaldið niður. Ein minking í oljuavgjaldinum hevði komið nóg fleiri fólkum til góða, enn skattalættin ger. Serliga tey eldru og familjurna vildu fingið ágóðan av lægri oljuavgjaldi, sigur John Johannessen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin.

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum heldur, at tað verður trupult at avtaka skattalættan fyri síðani at fíggja eitt lægri oljuavgjald.

– Vit hava eina samgonguavtalu um at lata ein skattalætta í fýra ár, og tað verður sera trupult at ganga burtur frá eini slíkari avtalu, sigur Bárður á Steig Nielsen.

### Ítøkilig uppskot í tinginum

Oljuprísurin er methøgur, og hóast stríð í Miðeystri og nattúruvanlukkur í USA kunnu kennast langt burturi, ávirkar tað eisini í Føroyum. Hesar hendingar eru viðvirkandi til, at bæði privatfólk og vinna mugu gjalda nógv meira fyri oljuna, enn tey hava gjørt seinnu árini.

Oljuprísurin til húsarhaldini er nú farin upp um 5 krónur fyri liturin, og av hesari upphædd eru 80 oyru í avgjaldi til landskassan, sum eisini fær mvg burtur úr søluni av olju.

Miðflokkurin hevur lagt eitt uppskot fyri løgtingið um at lække avgjaldið á olju, tá ið oljuprísurin er so høgur, sum hann er í løtuni. Kjarnin í uppskotinum hjá Miðflokkinum er, at avgjaldið skal prísregulerast, so at tað er hægri, tá ið oljuprísurin er lágur, og lægri, tá ið oljuprísurin fer upp um 2,45 krónur fyri liturin. Hetta skal so tryggja føroyingum bíligari olju.

– Hækkaða oljurokningin seinastu mánaðirnar er so ovurhonds fyri vanliga føroyska húsarhaldið, at mong í dag hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman. Einamest rakar hetta barnafamiljurnar og tey, sum einans hava pensjón at líta, siga Jenis av Rana og Bill Justinussen í viðmerkingunum til uppskotið, sum kemur til viðgerðar í løgtinginum hósdagin.

### Viðgera avgjald í samgonguni

*– Tað má verða eitt samlað landsstýri, sum ger av, um oljuavgjaldið skal lække, og hvussu hetta skal fíggjast. Men eg taki undir við, at skattalættin verður strikaður fyri at fíggja eina lækking av oljuavgjaldinum, sigur John Johannessen*

John Johannessen er fyri at lække oljuavgjaldið, men hann vil ikki atkvøða fyri uppskotinum hjá Miðflokkinum.

– Tað ber ikki til at atkvøða fyri einum uppskoti um at lække oljuavgjaldi uttan at hava eina loysn fyri, hvussu hetta skal fíggjast. Pengar skulu jú í landskassan, sigur John Johannessen.

Hann sigur, at bæði oljuavgjaldið og skattalættin eru partur av viðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár.

– Tað má verða eitt samlað landsstýri, sum ger av, um oljuavgjaldið skal lække, og hvussu hetta skal fíggjast. Men eg taki undir við, at skattalættin verður strikaður fyri at fíggja eina lækking av oljuavgjaldinum, sigur John Johannessen.

Landsstýrismaðurn við fíggjarmálum er ikki serliga sinnaður at tosa um einstøk evni, nú viðgerðin av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2006 er í hæddini, og nógv er at taka støðu til og hædd fyri.

– Skal oljuavgjaldið lækkast, so skal fígging eisini finnast til tað, og samgongan má finna eina felags støðu til hetta mál, sigur Bárður á Steig Nielsen.

# Settu sjóneykuna á harðskap

**Mánadagin var ráðstevna í Norðurlandahúsinum, har kyn og harðskapur vóru evni fyri fleiri fyrilestrum og kjaki**

RÁÐSTEVNA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Mánadagin var harðskapur í miðdeplinum í Norðurlandahúsinum.

Ráðstevna, sum hevði grundarlag í einum norðurlendskum granskingarátaki, ið gekk undir heitinum »Køn og Våld«, varð hildin í føroyska mentanarmiðdeplinum, og bæði føroyingar og útlendingar høvdu fyrilestrar.

Millum tey, sum røddu á ráðstevnuni, vóru Malan Marnersdóttir, Eyðun Andreassen, Elin R. Planck og Katrine Sidenius, yvirlækni á Rigshospitalets Center for Voldtægtsofre.

Ráðstevnan endaði við einum orðaskifti, har fólk eisini fingu høvi at seta spurningar ella gera viðmerkingar.



Myndatekstur (mynd frá ráðstevnu):
*Føroyingar og útlendingar røddu á ráðstevnuni um harðskap, sum varð í Norðurlandahúsinum mánadagin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Eivør skal syngja í nýggja Operahúsinum

**Eivør Pálsdóttir og Danmarks Radio Big Band fara á nýggja konserferð í oktober mánað, og konsertferðin endar í nýggja Operahúsinum í Keypmannahavn, har Eivør skal hava konsert saman við kendari danskari songkvinnu**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Eivør Pálsdóttir fer í oktober mánaði aftur at hava fleiri konsertir við Danmarks Radio Big Band. Konsertirnar byrja og enda í Danmark, men føroyingar sleppa eisini at uppliva Eivør saman við tí heimskenda danska orkestrinum.

Hóskvøldið og fríggjakvøldið 13. og 14. oktober fara Eivør og DR Big Band at spæla í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Fyrsta konsertin verður tann 5. oktober, tá ið tey spæla í Føllenslev, og síðani verður spælt í Nykøbing Falster, Haderslev og Birkerød, áðrenn leiðin verður løgd til Føroya.

### Saman við Caroline Henderson

Konsertferðin endar í nýggja Operahúsinum í Keypmannahavn tann 17. oktober. Hetta verður ein konsert, har Eivør og DR Big Band spæla ein part, og kenda danska songkvinnan Caroline Henderson spælir ein part av konsertini.

Fyrr í ár góvu Eivør og Danmarks Radio Big Band út eina fløgu, og tað verður við grundarlagi í hesari fløgu, at tær sjey konsertirnar í oktober mánaði verða hildnar.

# Fiski kongur skal finnast

**Árliga fiskikappingin í Norðoyggjum verður leygardagin. Luttakararnir fáa 9 tímar til fiska í, og síðan verður fiskurin seldur á uppboðssølu**

FISKIKAPPING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

»Hvør fjøl á floti«.

Tað er heitið á árligu fiskikappingini, sum skúlaskipið Dragin skipar fyri í Norðoyggjum.

Leygardagin verður hampiliga góð streymloysa, tí er ætlanin at hava fiskikappingin tá.

Bátarnir fara frá landi klokkan átta, og teir skulu verða aftur klokkan fimm seinnapartin. Tá verður veiðan løgd upp á Varpabrúnni í Klaksvík, og síðan verður uppboðssøla.

– Av trygdarávum er ikki loyvt at fara einsamallur, tað skulu minst tveir mans við hvørjum báti, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

### Avmarkingar í reiðskapi

Tað er bert loyvt at nýta snøri, snellu ella tráðu sum veiðureiðskap, og tað er ikki loyvt at fiska við aliringarnar. Seiður telur ikki við í vektini.

Besti báturin – tað vil siga báturin, sum hevur størst veiðu fyri hvønn mann – vinnur kappingina, og hann fær eitt ferðasteyp í varðveitslu. Manningarnar á trimum teimum bestu bátunum fáa eisini steyp til ognar.

### Enda við dansi

Í fjør var tað báturin Reynir við Elmari Simonsen og Tóri Simonsen úr Hvannasundi, sum vóru bestir. Næstbestur bátur var Syðritangi við Ólavi og Grími Poulsen , og triðbestur var Svartaberg við Sólarin og Marna Isaksen.

Dagurin endar við dansi í Skálanum kl. 23.00, har Flemming og vinmenn fara at spæla til út á miðju nátt.